Kappingarráðið

## TIL KUNNINGAR

**ISS Facility Service A/s selur síni partabrøv í P/f ISS Føroyum til P/f SMS**

Kappingareftirlitið hevur tann 14.10.2008 móttikið fráboðan frá Christian Andreasen, adv. um virkisyvirtøku.

P/f SMS og ISS Facility Service A/s stovnaðu P/f ISS Føroyar í 2004. P/f SMS eigur 45% av partabrøvinum, meðan ISS Facility Service A/s eigur 55%. Eftir galdandi partaeigarasáttmála hava partarnir felags ræði á P/f ISS Føroyum.

Sambært avtaluni millum partarnir yvirtekur P/f SMS øll partabrøvini hjá ISS Facility Service A/s. Avtalan viðførur sostatt at P/f SMS gerst einasti eigari í P/f ISS Føroyum. Talan er sostatt um virkisyvirtøku sambært Kappingarlógini §13, stk. 1, nr. 1.

Luttakandi fyritøkurnar høvdu báðar ein umsetning í 2007, ið var omanfyri 4. mió. kr. í Føroyum. Samlaði umsetningurin í Føroyum var omanfyri 75 mió. kr.

Kappingareftirlitið hevur kannað eftir, um yvirtøkan hindrar virknari kapping við tað, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist, sambært Kappingarlógini §15.

Kappingareftirlitið er komið til ta niðurstøðu, at yvirtøkan ikki hindrar virknari kapping, tí ongin broyting fer fram, ið hevur ávirkan á kappingina á marknaðinum. Yvirtøkan hevur við sær, at P/f SMS einsamalt fær ræðið á P/f ISS Føroyum.

Kappingareftirlitið hevur tí boðað fráboðaranum frá, at yvirtøkan hjá P/f SMS av P/f ISS Føroyum er góðkend.

Kappingareftirlitið, tann 17.10.2008

Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo